# Hava gloymt McFadden

Teir tríggir Kian Egan, Mark Feehily og Shane Filan eru allir barndómsvinir, sum koma úr Sligo nærhendir Dublin. Nicky Byrne og Brian McFadden, sum var við í bólkinum fram til 2004, vóru ískoyti, sum Simon Cowell valdi sum krydd til bólkin. McFadden valdi tó at royna seg sum solistur í 2004, og í dag er hetta ikki nakað, sum limirnir í bólkinum tosa stórvegis um.



# Sjeikaligir sjeikar

Hóast røddirnar eru góðar, so eru tað ikki bara hesar, sum skapa eitt boyband. Limirnir í Westlife teljast eisini millum teirra, sum draga mong og svong konufólkaeygu móti sær. Eitt nú hava limirnir vunnið sonevnd awards fyri Best Hair Cut (Kian Egan), Most Fancied Male (Shane Filan), Best Looking Pop Star (Shane Filan), Best Hari Cut (Nicky Byrne), Party Mentalist of the Year (Brian McFadden), Celebrity Dad Of The Year (Brian McFadden) og Most Stylish Man on X-Pose (Nicky Byrne).

# nakrantíð

# Vit gleða okkum

**Kanska størsta stjørnan av øllum í Westlife, Shane Filan, sigur við Rás2, at hann gleðir seg at koma til Føroya**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Morgunsendingin hjá Rás2 hevur í vikuni verið í London, og í morgun fingu tey orð á Shane Filan, sum verður mettur sum størsta stjørnan í West Life.

Við heiðurslønum sum Most Fancied Male, Best Looking Pop Star og Voice of the 21st Century hevur hann helst góðar møguleikar at fáa konufólkaknøini á Vágsbøi at skelva, og í øllum førum sigur hann, at hann gleðir seg at koma til Føroya.

– Vit hava spælt í nógvum londum. Bæði stórum og smáum. Sjálvir eru vit úr einum lítlum landi, hóast tit eru enn minni, men okkum dámar veruliga væl at koma víða um.

– Okkum dámar at syngja, og okkum dámar at framføra. Og tað plagar at rigga, líkamikið um fjøldin er stór ella lítil. Og vit gleða okkum veruliga til at framføra í Klaksvík. Og vit kunnu lova tykkum eina framúr framførslu, sum verður úti við tveir tímar langt, og har tit fáa øll okkara hitt umframt okkurt av nýggju útgávuni, sum kemur í ár.

Sjálvur ert tú úr einum lítlum írskum býi. Hvussu ber tað til, at tú og Westlife í dag eru heimskendir?

– Eg veit ikki. Vit settu ein bólk saman sum dreingir, og hesin bleiv síðani nakað broyttur eftir ynski frá útgevarunum. Vit hava verið hepnir at arbeiða saman við nøkrum framúr sangskrivarum, og vit hava arbeitt hart. Eftir 12 ár eru vit framvegis á toppinum, tí vit vita, hvat skal til, og vit vita, hvat Westlife er. So vit koyra bara á.

Hvat er tað besta við lívinum sum pop-stjørna?

– Ferðingin, haldi eg. At vit kunnu ferðast kring allan heimin – enntá á fyrsta flokki – og uppliva alt tað, sum vit gera. Síggja nýggj lond og hitta nýggj fólk. Og sjálvandi er tað eisini gott, um tú eisini kanst liva væl av hesum.

Er nakað, sum tær ikki dámar við hesum lívinum?

– Mest tað, at tú ofta ert ov nógv heimanífrá. Men í løtuni royna vit at koma heim ímillum ymsu konsertirnar, so júst nú er tann parturin ikki so galin. Og í veruleikanum er øgiliga lítið, sum er keðiligt við at vera ein partur av Westlife, haldi eg.

– Og vit fýra, sum eru í bólkinum, kennast eisini sera væl. Vit kendust, áðrenn fólk kendu okkum sum Westlife, og tí kunnu vit altíð vera púra erligir mótvegis hvørjum øðrum. Tað er avgjørt ein styrki hjá okkum. Og helst er tað høvuðsorsøkin til, at vit enn eru saman, tí vit vita altíð, hvar vit hava hvønnannan. Eisini tá vit eru ósamdir.

## FAKTA UM WESTLIFE

### Discografi

| Albums | | #UK Chart |
|---|---|---|
| 1999 | Westlife | #2 |
| 2000 | Coast to Coast | #1 |
| 2001 | World of our Own | #1 |
| 2003 | Turnaround | #1 |
| 2005 | Face to Face | #1 |
| 2007 | Back Home | #1 |
| 2009 | Where We Are | #2 |

### Uppsamling

| | | |
|---|---|---|
| 2002 | Unbreakable | #1 |

### Cover

| | | |
|---|---|---|
| 2004 | Allow Us to Be Frank | #3 |
| 2006 | The Love Album | #1 |

### Singles

| | | |
|---|---|---|
| 1999 | Swear It Again | #1 |
| 1999 | If I Let You Go | #1 |
| 1999 | Flying Without Wings | #1 |
| 1999 | I Have a Dream/Seasons in the Sun | #1 |
| 2000 | Fool Again | #1 |
| 2000 | Agains All Odds | #1 |
| 2000 | My Love | #1 |
| 2000 | What Makes a Man | #2 |
| 2001 | Uptown Girl | #1 |
| 2001 | Queen of my Heart | #1 |
| 2002 | World of Our Own | #1 |
| 2002 | Bop Bop Baby | #5 |
| 2002 | Unbreakable | #1 |
| 2003 | Tonight/Miss You Nights | #3 |
| 2003 | Hey Whatever | #4 |
| 2003 | Mandy | #1 |
| 2004 | Obvious | #3 |
| 2005 | You Raise Me Up | #1 |
| 2005 | When You Tell Me That You Love Me | #2 |
| 2006 | Amazing | #4 |
| 2006 | The Rose | #1 |
| 2007 | Home | #3 |
| 2008 | Us Against the World | #8 |
| 2009 | What About Now | #2 |

### Westlife-met

| | |
|---|---|
| Wolrd | Triðja mest seljandi boyband í tónleikasøguni |
| World | Mest seljandi bólkur síðani túsundáraskiftið |
| UK | Triðju mest fylgjandi #1 í UK |
| UK | Styttst tíð um at røkka tveysiffraðum milliónatali í sølu |
| UK | Triðju flestu #1 (14 ferðir) |
| UK | Flestu #1 á rað eftir debut |
| UK | Flestu top-10 og top-5 hits á rað |
| UK | Størstu áskoðarafjøld á Wembley |

evnaríkar, at hon setti seg í samband við Louis Walsh, sum var manager hjá Boyzone, men í fyrstu atløgu helt Simon Cowell ikki, at bólkurin var nóg góður til ein plátusáttmála. Hann segði, at broytingar vóru neyðugar, og hesar bóru við sær, at Lacey, Keighron og Garrett vórðu koyrdir úr bólkinum, og eftir fleiri auditions í Dublin vóru Nicky Byrne og Brian McFadden settir afturat bólkinum. 3. juli í 1998 skifti bólkurin navn til Westøside, men tá teir komu eftir, at ein annar bólkur nýtti hetta navnið, gjørdist tað til Westlife.

## Lupu bukk um restina

Gjøgnubrotið fingu teir longu sama ár, tá teir hitaðu upp, tá Boyzone og Backstreet Boys høvdu konsert í Dublin. Sama ár vunnu teir heiðurin fyri bestu framførsluna hjá einum nýggjum bólki, og eftir at fyrsta single-plátan varð send á marknaðin í mars 1999 rullaði tokið. Og tað við nógv størri ferð enn tað hjá Boyzone og Backstreet-Boys.

Swear it Again, If I Let You Go, Flying Without Wings, I Have a Dream/ Seasons in the Sun, Fool Again, Against All Odds og My Love endaðu allar sum #1 í Bretlandi, og tað var ikki fyrr enn móti jólum, at Westlife sendi eina single á marknaðin, sum "bara" gjørdist #2. Hetta tí Bob the Builder við Can We Fix It hevði rakt nakað, sum eingin annar megnaði um tað mundið.

Og ikki bara seldu singlurnar væl. Fyrsta veruliga útgávan, Westlife, leyp beint inn sum #2 í Bretlandi, men merkisvert er tó eisini, at hendan vikuna eftir gjørdi størsta droppið í bretskari tónleikasøgu, tá hon fall niður á eitt 37. pláss.

Men hetta hevur tó ikki steðgað teimum. Fyrimyndirnar frá hinum stóru dreingjabólkunum vórðu skjótt lagdar aftur um bak. Hevur Westlife staðið fyri eini útgávu, so er ein kassasuccés mest sum treytaleyst við í viðføringum. Eisini hóast McFadden valdi at fara solo – og harvið einsamallur til Klaksvíkar nøkur ár undan restini.

Bleytu balladurnar, har tey flestu duga tekstirnar, eru garantur fyri framúr stemningi á framførslum teirra, og so ber illa til at ímynda sær annað, enn at málið hjá SummarFestivalinum við sangbærum tónleiki í høgari góðsku aftur hevur funnið eitt plettskot.